# 75 føroyingar á bátaferð í norska

**Áður tosaðu menn undir neystavegginum um bátar, fiskireiðskap og veiði. Á bátaferð í Noregi, nú bátarnir meira minna um smáar og hugnaligar hotelíbúðir enn fiskifør, tosa menn og kvinnur um gardinur, betrekk og annað, sum hoyrir til hugnan umborð**

BÁTAFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@@sosialurin.fo*



*Heðin Zachariassen er sjálvur triðji við á ferðini í Noregi, og ætlandi kemur konan, sum fekk forfall undan fráferðini, yvir við flogfar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað er vorðið ein størri og týðandi partur av frítíðini hjá fleiri føroyskum familjum at halda frí í báti, bæði her heima í Føroyum og á ferðum uttanlands.

Fólk í bátum savnast á stevnum kring um landið um sumrarnar, og serliga eru tað bátastevnurnar, ið draga nógvar bátar við familjum til sín. Tær mest savnandi stevnurnar í so máta er árliga bátastevnan í Vestmanna og regattasiglingin, sum plagar at verða hildin sama vikuskifti, sum nólsoyingar skipa fyri ovastevnu.

Regattasiglingin byrjar á Eiði við hópin av bátum og endar á ovastevnu í Nólsoy.

Roynist veðrið, plagar Nólsoyarvík at verða fylt upp við bátum, sum eru við í regattasigling og øðrum bátum, sum leita sær út um fjørðin úr Havn, Argjum, Skálafjørðinum og aðrastaðni.

## Ljómandi hugni

Men tað eru ikki bara stevnurnar kring landið, sum savna fólk, ið eru vorðin bitin av at ferðast millum firðir og sund í egnum báti í frítíðini um sumrarnar.

Tað eru eisini familjur, sum hava keypt sær bát, ið ferðast einsamallar bygd úr bygd – ella ferðast saman við øðrum, leysar av øllum stevnum.

Møguleikarnir eru nógvir, og tað er bert hugflogið, sum setir avmarkingarnar.

Á kabússini eru góðir møguleikar at tilreiða døgurðan, men er góðveður, er vanligt at grilla búffar, pylsur og annað á dekkinum ella uppi á klettinum.

Eru fleiri bátar við í ferðini, er vanligt at syngja, meðan onkur spælir á harmoniku ella guitara.

Soleiðis kann hugni, sangur og tónleikur ljóma út í kvøldar-ella náttarkvirruna.

## Ferðir um hav

Tað eru eisini tey, ið hava fingið sær bát sum savnandi miðdepil í familjuni um sumrarnar, sum leita sær út um landoddarnar.

Í nøkur ár hevur við jøvnum millumbilum verið skipað fyri felagstúrum við Norrønu til Noregs, har Smyril Line syrgir fyri, at bátarnir verða fluttir trygt um hav. Siglt verður síðan innanskers í Noregi í tvær, tríggjar ella fýra vikur, og síðan verða bátarnir koyrdir umborð á Norrønu, sum førir teir heimaftur.

Norska náttúran er stórbar og fleiri, sum hava verið við á slíkum ferðum, siga, at hetta er besta summarfrí, tey hava havt.

Men hetta er so eisini ein øðrvísi summarfrí, har tú noyðist at klára teg við teimum fasilitetum, sum eru í bátinum og uppi á klettinum.



Fleiri familjur, sum vóru við tær fyrstu ferðirnar, hava verið við aftur og aftur – og sum árini eru liðin, eru fleiri og fleiri vorðin bitin av at sigla og hugna sær saman við øðrum.

Í fjør summar vitjaði eisini eitt stórt føroyskt bátafylgi í Hetlandi. Bátarnir fylgdust í bólkum á ferðini millum londini. Teir flestu lógu í Lerwick, meðan oyggjarleikir vóru og stevndu síðan heimaftur, tá ið líkindi vóru. Onkur steðgaði longri, legði leiðina upp til Orknoyggjar og vitjaði enntá heilt uppi í tí stóra Lockness-vatninum í Skotlandi.

## Aftur til Noregs

Við Norrønu úr Føroyum seinasta mánadag vóru tilsamans 24 bátar við familjum, sum enn einaferð eru farnar yvir til Noregs at sigla og hugna sær millum bygdirnar í norska skergarðinum.

Tann eini av monnunum hevði júst keypt sær bát og skuldi eftir bátinum í Noregi, áðrenn hann fór upp í fylgið.

Sosialurin var við Norrønu á ferðini úr Føroyum til Noregs. Vit eygleiddu bátsfólkið á ferðini yvir, og vit eygleiddu tey, meðan bíðað varð á bryggjuni í Bergen eftir, at bátarnir komu í land av Norrønu og skuldu sjósetast til ferðina.

Veðrið í Bergen hendan dagin var so avbera gott við brennandi sól og nógvum hita.

Hýrurin var góður, og fólk – bæði ung, tilkomin og eldri – sóu fram til eina hugnaliga summarfrí fram við norsku strendrunum.

Umborð á Norrønu hittu vit bátsfólk, sum greiddu frá, hvat tey gera á eini slíkari ferð.

Í einum øðrum blaði fara vit at tosa við onkran av hesum.

Áður tosaðu menn undir neystaveggjum um bátar, fiskireiðskap og veiði, men á slíkum ferðum sum hesari, tosa menn og kvinnur meira um gardinur, betrekk og annað, sum hoyrir til hugnan umborð.

## Eingin stættamunur

Tað, sum sermerkir umhvørvið millum bátafólk, er, at eingir er yvir – og eingin er undir, um vit so kunnu siga. Tú møtir øllum sløgum av fólki, og eingin spyr, um tú ert vanligur arbeiðsmaður, skipari, sálarfrøðingur, borgarstjóri ella



*Í góðveðrinum verður bíðað eftir, at bátarnir verða flotaðir í Bergen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*